

Leiðari og starvsfólk til Barnaverndarstovu Føroya

# Gerist verjar hjá børnunum

Barnaverndarstova Føroya fer at virka 1. november 2005. Barnaverndarstovan skal samskipa og stimbra alla barnavernd kring landið, so at verjan av okkara komandi ættarliðum verður styrkt. Við hesum verður lýst eftir einum leiðara og einum starvsfólki til Barnaverndarstovu Føroya

**Leiðari til Barnaverndarstovu Føroya**
Starvið sum leiðari fyri Barnaverndarstovu Føroya verður at seta 1. november 2005, ella sum hóskar til uppsagnarfreistina í einum verandi starvi.

**Uppgávur og avbjóðingar** Leiðarin kemur at hava dagligu leiðsluna á Barnaverndarstovu Føroya. Hann skal frá byrjan vera við til at mynda og skapa ein vælvirkandi tænastudepil fyri lokalu barnaverndarøkini í samsvari við ásetingarnar í barnaverndarlógini.

**Førleikakrøv** Leiðarin skal hava hóskandi ástøðiliga útbúgving og hava hollan kunnleika til sosiala økið, kommunal viðurskifti og fyrisitingarrætt. Tað er ein fyrimunir, um leiðarin hevur leiðsluroyndir ella royndir av at samskipa størri verkætlanir.

Leiðarin skal vera virkisfúsur, hava evni at arbeiða sjálvstøðugt og duga at samskipa og samstarva tvørtur um faklig mørk. Neyðugt er eisini, at leiðarin hevur evnini at skapa samstarvsvilja ímillum lokalu barnaverndarøkini, og at viðkomandi hevur innlivingarevni og kann seta seg inn í ymsu fyritreytirnar, barnverndarøkini kring landið hava.

**Setanarviðurskifti** Starvið verður lønt í samsvari við fakligan førleika og royndir

**Starvsfólk til Barnaverndarstovu Føroya**
Starvsfólk á Barnaverndarstovu Føroya verður at seta 15. november, ella sum hóskar til uppsagnarfreistina í einum verandi starvi.

**Uppgávur** Starvsfólkið fer í tøttum samstarvi við leiðaran at mynda Barnaverndarstovu Føroya.

**Førleikakrøv** Starvsfólkið skal hava sosialfakliga útbúgving og helst hollan kunnleika til barnverndarøkið. Viðkomandi skal hava góð samstarvsevni og duga væl at samskipa og raðfesta arbeiðið.

**Setanarviðurskifti** Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**Fyri bæði størvini er galdandi:**
**Starvsstaður** Skrivstovan kemur at liggja í Tórshavn. Roknast má við, at nakað av ferðing verður til barnaverndarøkini kring landið

**Umsókn** Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu saman við avriti av prógvum v.m. sendast

Barnaverndarstovu Føroya
Lucas Debesargøta 6-8
Postboks 53
110 Tórshavn

**Umsóknarfreistin er 5. oktober.**

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Kommunusamskipan Føroya, tel 32 21 80, ella Føroya kommunufelag, tel 44 76 00.

Starvsprofilar finnur tú á heimasíðunum www.ksf.fo ella www.fkf.fo

**Barnaverndarstova Føroya**
Í nýggju barnaverndarlógini verður álagt øllum kommununum í Føroyum at vera felags um eina barnaverndarstovu . Í hesum sambandi hava Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag vegna allar kommunur í Føroyum tikið stig til eina felagskommunala barnaverndarstovu, ið ber heitið Barnaverndarstova Føroya.

**Uppgávur sambært nýggju barnaverndarlógini**
Nýggja barnaverndarlógin fer at virka frá 1. januar 2006, og tá verður størsti parturin av barnverndarøkinum lagdur út til kommunurnar at umsita. Í lógini verður álagt kommununum at finna saman í samstarvseindir ella barnaverndarøki á í minsta lagi 1500 fólk, og í tilknýti til hesar eindir at seta felags barnaverndarnevndir og umsitingar sum skulu málsviðgera og taka avgerðir í barnaverndarmálum.

**Høvuðsuppgávan hjá Barnaverndarstovu Føroya verður at**
- styrkja og samskipa lokalu barnaverndarøkini kring landið
- vegleiða og ráðgeva lokalu barnaverndarøkjunum í almennum spurningum
- skipa fyri undirvísing og skeiðvirksemi
- skipa og umsita eina fosturforeldraskipan fyri alt landið

Barnaverndarstova Føroya er sostatt ein týðandi fyritreyt fyri at kommunalu barnverndarøkini kring landið koma at virka nøktandi.

www.sansir.fo

Barnaverndarstova Føroya
R. C. Effersøesgøta 30, 100 Tórshavn